# Grímur Kamban landar á Sandi

Í morgun kom Grímur Kamban til Sands at landa. Trolarin landar eini 80.000 pund til P/F Sandoy Seafood, skrivar bkv.fo. Fiskurin verður síðani koyrdur av Sandi til Skopunar, har hann verður arbeiddur á virkinum í Skopun. Sum skilst er støðugt arbeiði á virkinum hjá Sandoy Seafood.



# Møtir í eina heila viku í Klaksvík

Sunnudagin byrjar árliga missiónsvikan í KFUM&K í Klaksvík. Tað sum ger hesa vikuna serstaka er valið av evnum, sum tann einstaki talarin hevur fingið tillutað: Talan er nevniliga um tey sjey seinastu orðini, sum Jesus segði á krossinum. Umframt góðar talarar fara eisini fleiri ymiskar sangkreftir at seta sín dám á møtini. Frá hósdegi verða barnamøti, har evni úr páskahátíðini verða lýst á ymiskan hátt.

# rnar



*Hevði veðrið verið teimum til vildar, vóru húsini helst tekjað longu nú. – Men vit mugu bíða eftir einum góðum degi, siga teir báðir ídnu handverkararnir í Hvannasundi*

seta seg her. Hvussu hetta hevur eydnast, vísa hagtølini og hetta sæst eisini við berum eygum.

Sambært Hagstovuni hevur fólkatalið í Hvannasundi ligið millum 260 og 270 tey seinnu árini.

Við seinastu uppteljing, sum varð gjørd fyri august mánað í ár, búðu 261 fólk í Hvannasundi og beint oman fyri 440 fólk í Hvannasunds kommunu, ið haraftrat fevnir um bygdirnar Norðdepil, Múla, Depil og Norðtoftir.

Við berum eygum ber eisini til at staðfesta, at her fer at koma enn meiri lív í bygdina: Umframt hesi húsini, standa eini onnur í gerð beint eystanfyri og eini fara skjótt í gerð hinumegin sundið, í Norðdepli.

Hetta hendir hóast onkur hevur tosað um, at bygdin neyvan fór at vaksa so leingi sum einki verður gjørt fyri at betra um samferðsluviðurskiftini gjøgnum tunlarnar á Borðoynni.

Líkt er til, at fólkið norðan fyri kortini hevur eina vón um eina bjarta framtíð!

## Bíða eftir veðri

Teir byrjaðu at smíða hesi húsini uttarlaga í Hvannasundi mitt í summar, og nú er arbeiðið komið so mikið væl áleiðis, at húsini eru innlokað og vindeygu og hurðar sett í.

Hetta gevur teimum eisini tann fyrimunin, at ber ikki til at arbeiða uttandura fyri veður, er altíð okkurt sum teir kunnu gera innanveggja.

Júst hetta sama gjørdu teir mikudagin í hesi vikuni. Tað var gott veður í Klaksvík og aðrastaðni í landinum, men her í Hvannasundi var ikki veður til uttandura arbeiði henda fyrrapartin.

- Vit vóru annars byrjaðir at tekja, men veðrið bleiv so keðiligt, at vit máttu gevast við tí. Eg meti, at tað er umleið helvtin eftir at tekja, sigur Ditlev.

- Ja, svarar Ludvík til. – Fáa vit einar 2-3 góðar dagar aftrat, so skuldi tað arbeiðið verið fingið frá hondini!

Annars hava teir klætt ein part av húsunum. Men tá Sosialurin vitjaði í Hvannasundi, stóð tann niðara síðan enn uttan klædning.

– Vit hava skorið alt tilfarið til, og tað er klárt at seta upp. So tað skuldi ikki tikið so langa tíð, bara vit sleppa í sving!

## Nokk at gera

Henda mikudagin, tá vit vitjaðu í Hvannasundi vóru teir í ferð við at skildra rúmini av bæði í ovaru og niðaru hæddini.

Veðrið bjóðaði jú ikki beinleiðis til uttandura arbeiði, og tí vóru teir báðir bara í ferð við skildra rúmini av í ovaru hæddini.

Hetta eru eini stór og væl útgjørd hús í tveimum hæddum, hvør uppá 130 fermetrar.

Tá hetta arbeiðið er liðugt, skulu næstu handverkararnir framat – eletrikararnir, áðrenn timburmenninir leggja seinastu hondina á veggirnar við bjálvingini.

- So tú sært, tað er altíð nokk fyri hendurnar, sum Ditlev tekur til.

## Onnur hús

Júst hetta við arbeiði til allar handverkarahendur, er eisini ein spurningur, sum mong seta sær í dag.

Í einum so avmarkaðum øki sum Norðoyggjum, og har teir fyri tað mesta hava arbeitt í bygdunum norðan fyri tunlarnar – tað er: Hvannasund, Norðdepli og á Viðareiði – skuldi ein trúð, at talið av arbeiðsuppgávum var avmarkað.

Líkt er til, at menninir hjá Krisfinni hava so gott orð á sær, at teimum ikki fer at tróta arbeiði í bræði:

– Vit skulu í holt við eini onnur hús í Norðdepli nakað skjótt, sigur Ditlev.

Hann væntar, at tá teir eru komnir nakað meiri áleiðis við hesum húsunum í Hvannasundi, fara teir at »leggja út«, sum tað eitur á fakmáli, fyri tí næsta húsinum í bygdini hinumegin sundið.

– Eg kann ikki siga akkurát nær tað verður. Men vit vænta at tað verður fyrsta dagin!



# Sparing við nýggjari hitaskipan

**Í dag verður so nógv tosað um orkusparing og alternativa orku. Og eigarin av hesum húsunum í Hvannasundi hevur eisini valt at ganga á odda á hesum økinum.**

**Hann hevur nevniliga útvegað sær eina serstaka hitaskipan við eini luft-til-vatn-skipan og við einum heitvatnstanga uppá 300 litrar.**

**Henda skipanin, ið kemur frá bygging.fo í Sandavági virkar á mangar mátar sum ein hitapumpa, og gevur eins nógvan hita frá sær, sum tær meiri kendu hitapumpurnar.**

**Eitt sum serkennir hesa skipanina er at stýriskipanina er inni í einum heitum og tryggum kjallara ella vaskirúmi. Við tí stóra heitvatnstanganum ber til at brúsa sær í útivið tveimum tímum – hvør so enn skuldi havt hug til tað! –uttan at vatnið verður kalt.**

**Bæði Ludvík og Ditlev hava sjálvur heilt ella partvíst fingið sær hvør sína hitaskipan av hesum slagi, og teir lata báðir sera væl at.**

**- Hetta sparir sera nógva orku, siga teir báðir við ein munn.**

*Nýggja luft-til-vatn-skipanin sparir nógvan pening.*
*– Eg havi sjálvur eina, sigur Ludvík Lydersen*